

*Tað gekk bæði skjótt ov væl fyri seg, tá ungdómurin settist á løgtingssessirnar mánadagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ungdómspower

**Mánamorgunin tóku 32 næmingar úr 9. flokki sæti á tingi. Næmingarnir løgdu uppskot fram, høvdu orðaskifti og nevndarfundir**

UNGDÓMSTING

*Jákup Mørk*
*Jákup@sosialurin.fo*

Mánamorgunin tóku 32 næmingar sæti á tingi, har Føroya fyrsta ungdómsting varð sett.

Fyrst á skránni til ungdómstingið var, at ungdómstinglimirnir møttu í Løgtinginum, har tey fingu eina frágreiðing um tingið. Síðani setti Edmund Joensen fundin og næmingarnir løgdu uppskot síni fram. Uppskotini vórðu beind í nevndir, sum næmingarnir mannaðu seinnapartin. Í álitunum sum nevndirnar orða, skulu næmingarnir mæla til, at í minsta lagi eitt uppskot skal samtykkjast, og í minsta lagi 1 uppskot skal falla.

Sambært Edmund Joensen, løgtingsformanni, er endamálið við tiltakinum lutvíst at geva næmingunum størri innlit í tað at vera ein partur av fólkaræðinum, umframt at vísa næmingunum, hvussu fólkaræðið virkar í veruleikanum. Harumframt er endamálið at geva næmingunum innlit í, hvør leikluturin hjá Løgtinginum er, og hvat arbeiðið hjá tinginum fevnir um.

STANLEY

Dygdar skjótihurðar, við kúluleiðum
- verða gjørdar eftir uppgivnum mátum



á Hjalla - 188 Hoyvík
Tlf 315415 - Fax 319001

damor

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




Marknaðarfólk

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álitandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gudny Langgaard á tlf. 341823. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 17. februar, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*